# Norðskála kirkja 75 ár

**Farna sunnudag hátíðarhelt kirkjan við Norðskála, at tað í januar í ár vóru 75 ár liðin síðani kirkjan varð vígd. Tvær gudstænastur vóru, modellið av sluppini »Verdandi« varð avdúkað og eftir tað var bygdarfólkið savnað í Eydnuni á Oyrarbakka, har øll vóru vælkomin til náttturða, og nøkur orð um kirkjuna vórðu borin fram**

## Kirkja



**Rólant Waag Dam**
blaðmaður
rolant@sosialurin.fo



*Norðskála kirkja var stúgvandi full av fólkum, tá hon hevði hátíðargudstænastu farna sunnudag, í samband við at tað eru 75 ár liðin síðani kirkjan varð vígd*

Tað var tann 10. januar í 1932, at Jákup Dahl, próstur, vígdi Norðskála kirkju. Tosið um at byggja kirkjuna byrjaði nøkur ár frammanundan, tað var í 1920'unum. Um várið í 1927 var bygginevnd vald og tvey ár seinni sendu nakrir íbúgvar í Svínáum, við Norðskála og av Oyri umbøn til Føroya Løgting, um at fáa stuðul til at byggja kirkju.

Áðrenn hetta hevði presturin á Nesi tá, Wilhelm Nielsen, í fyrru helvt av tjúgunum sent út eitt "opraab", sum hann kallaði tað, har hann heitti á kirkjufólkið, um at fáa bygt eina kirkju, sum skuldi standa liðug í seinasta lagi í 1928.

Nær umsóknin er send inn til kirkjustjórnina sæst ikki í gerðabókini, men 24. august 1929 hevur kirkjunevndin hjá Løgtinginum lagt álit fram. Í álitinum stendur, at umsókn er komin til Føroya Løgting frá íbúgvum í Svínáum, Norðskála og Oyra, um at fáa studning til at byggja kirkju.

23. februar 1930 varð samtykt at bjóða arbeiðini út. Arbeiðið við útgrevstri varð samtykt at fara undir beinanvegin.

Stoypiarbeiðið byrjaði á Mortansmessu, 11. november 1930, Martin Danielsen tók sær av hesum. Byggiarbeiðið gjørdi Maskinsnikkaravirkið í Miðvági við Heina Joensen, og tað kostaði 11243 krónur og 52 oyru.

Poul Isaksen tók sær av málingararbeiðinum, sum kostaði 1175 krónur. Tekningina gjørdi H. C. W. Tórgarð



### Harrin byggir húsið

2. desember sama ár legði Jákup Dahl, próstur, grundarsteinin í fundamentið í eysturgalvinum miðskeiðis fyri altarinum, og har stóð soleiðis skrivað:

"Um Harrin ikki byggir húsið, tá arbeiða smiðirnir til einkis".

Kirkjan varð bygd í eini tíð, har togan var um kirkjumálið skuldi verða danskt ella føroyskt. Sunnudagin hin 18. oktober var tí fólkaatkvøða um skriftstøðini undir altartalvuni og úti í forkirkjuni skuldu verða á føroyskum ella á donskum. Úrslitið var, at 40 atkvøddu fyri føroyskum og 29 fyri donskum.

### Prestur í bygginevndini

Farna sunnudag greiddi Jóhan

*Jóhan Petur Petersen er úti í Eydnuni fortelur um arbeiði við kirkjuni við Norðskála. Til vinstru fyri hann hóma vit Emil Olsen, prest, ið lýður á*

Sosialurin